## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
eirikur@sosialurin.fo



# MEIRA DYGD Í FLOKSARBEIÐIÐ

Tað var áhugavert at hoyra teir báðar fráfarnu høvdingarnar í føroyskum politikki, Jóannes Eidesgaard og Anfinn Kallsberg í Eygsjón í gjár kjakast um, hvørt føroyskur politikkur hevur flutt seg til at snúgva seg um einstaklingar heldur enn um flokkar. Tað hildu teir báðir, og rætt er tað.

Føroyskur politikkur snýr seg alsamt meira um persónar, og politikarar gera sær meira og meira dælt av hesum.

Vit kunnu spyrja, hví so er. Í Eygsjón var svarið, at tað er valskipanin – tað at Føroyar eru eitt valdømi, sum er orsøkin til, at sjálvsøkni fyllir meira í føroyskum politikki.

Tað kann hava sína lutfalsligu orsøk. Men ein annar stórur trupulleiki er, at flokkarnir í sær sjálvum eru ov veikir. Meðan almenna umsitingin er støðugt ment, so eru politisku flokkarnir skipaðir eins og teir altíð hava verið. Har eru leikfólk, sum stjórna og gera tað mesta arbeiði sjálvboðið, og tað ber sjálvandi ikki til við teimum krøvum, sum eiga at verða settar til slíkar skipanir, sum politisku flokkarnir eru. Vit kunnu verða samd ella ósamd við ymsu politisku flokkarnar, men flokkar, sum arbeiða óprofessiónelt, teir eru til miklan skaða, meðan ein flokkur – sum vit eru ósamd við – men sum arbeiðir professiónelt, hann gagnar demokratisku prosessini og er við til at menna demokratiið og stuðlar soleiðis undir samfelagsmenningina. Tí eiga resursir at verða settir av, so politisku flokkarnir kunnu skipast á einum nøktandi grundarlag.

Javnaðarflokkurin er á einum rættiliga týðandi vegamóti nú. Hann stendur í veruleikanum fyri síni størstu avbjóðing nakrantíð. Men klárar hann at gjøgnumføra hesa demokratisku prosessina á ein fullgóðan hátt, so hevur tað ógvuliga stóran týdning – bæði fyri flokkin, men eisini fyri demokratisku tilgongdina sum heild.

Tað verður sera áhugavert at síggja, hvussu Javnaðarflokkurin kemur ígjøgnum tilgongdina við at velja nýggja formann ella forkvinnu, og hvussu nýggja leiðslan fer at megna at markera flokkin fram til løgtingsvalið. Javnaðarflokkurin er ríkasti flokkur í Føroyum, eigur nógvar milliónir krónur á bók. Ein nýggj ung leiðsla í Javnaðarflokkinum hevur tí allar møguleikar at seta dagsskránna við javnaðarpolitikki, eins og gjørt verður í øllum grannalondum. Tá tað ber til í Íslandi, í Onglandi, í Noreg og í Danmark. Hví skal tað so ikki bera til í Føroyum.

At tíðin er farin frá ávísum flokkum, tað er fjas. Tað snýr seg bara um at duga at halda fokus – og duga at hava samband við fólkið.



**» Flokkurin stendur fyri síni størstu avbjóðing nakrantíð**

---

## Heðin skal bjarga flokkinum



Borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, bjóðar seg nú fram sum frelsaran hjá Javnaðarflokkinum! Ja, hví ikki tað, eru tað fleiri sum siga – og so verður hann speirikin við, at hann hevur umboðað tríggjar flokkar í Tórshavnar Býráð, og tí kann hann ikki verða floksleiðari.

Well. Spurningurin er, hvør er nóg góður javnaðarmaðour. Heðin Mortensen plagar at siga, at hann var við til at stovna SU, ungmannafelagið hjá Javnaðarflokkinum. Og jú, tá vit spyrja, so var hann ein av teimum unglingunum, sum var møttu í Losjuni í Havn hendan 28. oktober í 1965, tá Sosialiskt Ungmannafelagið varð stovnað.

Heðin Mortensen varð valdur í Tórshavnar Býráð fyri Uttanflokkalistan hjá Petur í Gong í 1972. Sum navnið sigur, so var tað ein uttanflokkalisti við fleiri persónum, sum vóru organiseraðir í ymsum flokkum.

Í 1987 stillaði Heðin Mortensen upp fyri Sambandsflokkin til fólkatingsval, og árið eftir varð hann afturvaldur í Tórshavnar býráð – nú fyri Sambandsflokkin. Hann varð valdur á ting fyri Sambandsflokkin í 1998, og til valið í 2002 setti hann met við at fáa 399 persónligar atkvøður – uttan at verða valdur.

Við býráðsvalið í 2004 stóð Heðin Mortensen til at gerast borgarstjóri, men tað vildu floksfelagar hansara í Sambandsflokkinum ikki. Heðin Mortensen skipaði tí samgongu saman við Javnaðarflokkinum og Tjóðveldinum – og eftir at hann var koyrdur úr Sambandsflokkinum meldaði hann seg inn í Javnaðarflokkin. Á býráðsvalinum í 2008 setti Heðin Mortensen met við at fáa 2.200 persónligar atkvøður – og hann hálaði tríggjar aðrar býráðslimir við sær og gjørdi Javnaðarflokkin til størsta flokk í høvuðsstaðnum við fimm av 13 býráðslimum.

– So ja, hví skal Heðin Mortensen ikki bjarga Javnaðarflokkinum enn einaferð? Hann fekk Javnaðarflokkin frá 17 til 32 prosent. Tað er eingin sum sigur, at fyri tað um tað ber til í Havn, so ber tað til allastaðni. Men tað er stuttligt og kveikjandi, at ein persónur er so eldhugaður og brennir so nógv fyri eini søk, sum borgarstjórin í Havn ger. Men Suðurstreymoyar Javnaðarfelag skal skjóta onkran upp til formanssessin – og koma allir kandidatarnir úr Havn, so hevur felagið ein trupulleika...



**» Kollvelting at fáa vatn**

MIÐVIKAN
KJAK Á SÍÐU 22-23



**» Nei til kirkju á Argjum**

RÚNI M. DJURHUUS
KJAK Á SÍÐU 19




## Hugsa um aðalskrivara

Á seinasta landsfundi hjá Javnaðarflokkinum kunngjørdi Jóannes Eidesgaard, at flokkurin fór at seta ein aðalskrivara 1. januar í ár. Tá hann nevnir »aðalskrivara«, so hava vit hugsað um tað, sum tey í øðrum londum kalla »spindoktor«.

Jóannes Eidesgaard sigur, at tað var eisini meiningin, men at tann persónurin, sum talan var um, leyp frá. Flokkurin hevur tosað við einar fimm persónar um hetta starvið, men eingin hevur bitið á, tá til stykkis kom.

Tað er mikið áhugavert, at ein flokkurin arbeiðir við slíkum ætlanum. Tí hetta er tað sum manglar hjá flokkunum. Flokkarnir í Føroyum arbeiða sum glaðir amatørar, lítið skil er á boðskapinum, og sum heild duga politisku umboðini illa at stuðla hvørjum øðrum, øll vilja hava eina meining um alt - og skulu markera seg í øllum málum.

Javnaðarflokkurin hevur tað fram um allar hinar flokkarnar, at hann eigur nógvar milliónir á bók, tí flokkurin seldi í 2006 Sosialin fyri 10 milliónir krónur.

Tí kann nýggja leiðslan – um hon vil – seta fólk og spunasmiðir, og rættiliga gera seg galdandi í nýggju miðlum á netinum sum Facebook, Twitter og øðrum, sum í hesum døgum eru við at fella fleiri arabiskar einaræðisharrar.

Eitt er vist, at svevur Javnaðarflokkurin víðari – og verður tað barnsliga fjasið um Gerhard Lognberg, sum skal seta dagsskránna, so er slagið longu tapt...

Nú er lagaliga løtan...

Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*